


Álitið Heildarpsykiatri 2002:

# Tað optimala er ikki realistiskt

**Framkomin tøkni og dýrar maskinur eru ikki tað sum skal til, fyri at betra um støðuna hjá sálarliga sjúkum í Føroyum. Tað, sum brúk er fyri, er fólki við hollari útbúgving, og eini skipan, sum tryggjar, at kreftirnar vera nýttar har, tær gera størstu nyttuna.**

PSYKIATRI
*Jóanes N. Dalsgaard*

Hósdagin í síðstu viku var álitið Heildarpsykiatri 2002 almannakunngjørt. Ein stýringsbólkur hevur staðið fyri útgreiningararbeiðinum aftanfyri álitið. Tórmóður Stórá, sum er lækni, hevur verið samskipari í stýringsbólkinum. Sosialurin hevur tosað við Tórmóð um álitið og um psykiatri í Føroyum.

### Tað optimala er ikki realistiskt

Álitið Heildarpsykiatri 2002 leggur upp til, at tørvur er á nógvum fólkum við psykiatriskum viðgerðarførleika. Samstundis er tað ein sannroynd, at sera trupult er at fáa mannað tey størv, sum longu eru normeraði. Hvussu hongur hetta saman?

–Vit hava roynt at samansjóða tað optimala og tað realistiska. Álitið frá 1991, "Glottar fyri framan" leggur upp til, at vit skulu hava økispsykiatri í Føroyum. Tí tankanum hava vit slept, tí vit meina at tað verður ov orkukrevjandi. Vit meina, at vit kunnu geva eitt betri viðgerðartilboð, við at savnað viðgerðarorkuna á einum stað. Tey fakfólkini, sum eru, skulu nýta tíðina uppá at viðgera sjúklingar, og ikki uppá at ferðast við Strandferðsluni og Bygdaleiðum. Tað optimala var, at fólk kundu verið viðgjørd í nærumhvørvinum. Men vit hava skriva álitið við virðing fyri realitetunum. Millum hesar realitetir eru avmarkað fíggjarlig og faklig orka, sigur Tórmóður Stórá.

### Kreftirnar skulu brúkast betri

Sum er, heldur Tórmóður Stórá ikki, at kreftirnar í viðgerðarskipanini vera brúktar á rættan hátt.

–Vit vilja hava, at greiður skilnaður verður gjørdur ímillum tær læknaligu uppgávurnar og tær uppgávurnar, sum aðrir fakbólkar skulu loysa. Tað er ein tradition, at tá fólk skulu til ambulant kontrol, so skulu tey hitta ein lækna. Men í 8 av 10 førum er hetta als ikki neyðugt. Við at gjørt skipanina meira liðiliga, kundi tað verið so, at tað vóru ymsir fakpersónar, sum tóku ímóti sjúklinginum, alt eftir hvørjari ráðgeving ella viðgerð sjúklingurin hevði tørv á. Fyri langtíðarsjúklingar er tað ikki avgerandi, at samskifti við viðgerðarskipanina gongur ígjøgnum ein lækna. Tað avgerandi er, at sjúklingurin hevur samskifti við viðgerðarskipanina. Hetta samskiftið kann líka so væl vera røkt av økispsykiatriskum sjúkrasystrum undir heimasjúkrasystraskipanini, sigur Tórmóður Stórá.

### Færri læknar – fleiri sjúklingar

Tórmóður Stórá nevnir tann trupulleikan, at talið á kommunulæknum er í minking. Hetta merkir fyri tað fyrsta, at longri verður ímillum kommunulæknarnar í framtíðini. Men tað merkir ivaleyst eisini, at tann einstaki kommunulæknin fer at vera styttri tíð í hvørjum starvinum. Fyri sjúklingarnar merkir hetta fyrst og fremst, at tað verður truplari at sleppa til lækna. Men tað merkir eisini, at møguleikin hjá einstaka kommunulæknanum at koma at kenna síni viðskiftafólk, verður munandi skerdur.

Fyri fólk, við sálarligum trupulleikum merkir hetta, at longri tíð gongur áðrenn tey yvirhøvur koma til lækna. Tørvurin á viðgerð verður tískil meira átroðkandi, tá tey koma til lækna, enn hann hevði verið, um skjótt og lætt var at koma til lækna. Tess skjótari farast kann undir viðger, tess minni viðger er ofta neyðug. Um skjótt verður atborið, kann kanska sleppast undan innleggjan, og merkir hetta, at minni orka skal brúkast uppá einstaka sjúklingin. Tann orkan, sum her verður spard, kann so brúkast aðrastaðni í skipanini, har tørvur er nógvari á orku, t.d. til arbeiði við tungum sjúklingum, sum í dag kanska eru við skerdan lut.

### Einki rúm fyri lokalum loysnum

Ein avleiðing av kommunulæknatrotinum er sostatt, at fólk við tørvi á psykiatriskari viðger, ikki koma í viðger, fyrrenn støðan er akut. Hetta mótarbeiðir einum ynski, sum verður sett fram í álitinum, um at avdramatiserað sálarsjúku sum fyribrigdi í samfelagnum. Eitt av endamálunum við økispsykiatriini var eitt endamálunum at skapa opinleika um sálarsjúku. Ein slíkur opinleiki kundi hugsast at havt við sær, at bæði sjúklingarnir og avvarðandi vóru kvikari at gera vart við seg, um tørvur var á viðger. Møguleikin fyri skjótt at koma í ambulanta viðger hevði eisini kunna havt við sær, at fylgjurnar av sálarsjúku vóru gjørdust munandi minni. Við einum psykiatriskum depli í Havn, har dentur verður lagdur á ambulanta viðger, kunnu vit siga, at møguleikin at sleppa í viðger skjótt er munandi batnaður. Men opinleikin um sálarsjúku, sum økisspsykiatriin skuldi fremja, fer í stóran mun fyri skeyti. Tórmóður Stórá staðfestir pessimistiskt, at hetta eru útlitini og møguleikarnir í eini tíð, har tað er ein sannroynd, at alt færri læknar verða til at taka.

### Bíða og versna – ella gjalda

Ein onnur avleiðing av læknatrotinum er, at fólk koma ov seint í viðger. Tórmóður Stórá greiðir frá, at kommunulæknin í dag hevur tríggjar møguleikar, tá hann stendur við einum sjúklingi, sum hevur sálarligar trupulleikar. Hann kann innleggja sjúklingin, men tá krevst at sjúklingurin er rættiliga vánaligur. Kommunulæknin kann eisini ávísa sjúklingin til privata viðtalu hjá einum psykiatara, men har er altíð langur bíðilisti at sleppa framat. Endiliga kann kommunulæknin ávísa sjúklingin til ein privatpraktiserandi psykolog, men tá noyðist sjúklingurin sjálvur at gjalda fyri viðgerðina. So samanumtikið hevur kommunulæknin ikki teir stóru møguleikarnar at hjálpa einum sjúklingi við byrjandi sálarligum trupulleikum. Hevur sjúklingurin ikki ráð at gjalda fyri at fara til psykolog, má hann bíða, antin til hann kann sleppa til psykiatara ella til hann er so vánaligur at hann kann innleggjast. Um til bar at geva nøktandi ambulanta viðger beinanvegin sum fyrstu sjúkutekinini vístu seg, hevði innleggjan í nógvum førum ongantíð komið uppá tal.

### Nýhugsan

Tórmóður Stórá nevnir sum ein trupulleika í verandi viðgerðarskipan, at hon er so óliðilig. Viðgerðin er býtt upp í kassar, og sjúklingurin verður so settur inn í tann kassan, sum svarar til hansara heilsustøðu. Hetta merkir m.a. at sjúklingar ígjøgnum eina viðger kunnu vera fluttir deild av deild, og vera viðgjørdir av nógvum ymiskum fólkum.

Tórmóður sigur, at hetta er sera óheppi. Fyri viðgerðina er tað umráðandi, at sjúklingarnir kenna seg tryggar, sigur hann. Tí er tað umráðandi, at tað eru tey somu fólkini, sum eru um einstaka sjúklingin ígjøgnum alla viðgerðina. Tá ein sjúklingur vera fluttur av einari deild á aðra merkir tað, at hann, sálarliga viðbrekin sum hann er, skal nýta orku til at venja seg við eitt nýtt umhvørvi við øðrum starvsfólkum og øðrum medsjúklingum.

Tórmóður Stórá sigur, at kanningar gjørdar aðrastaðni vísa, at tílík flyting darvar viðgerðini. Tí verður í álitinum mælt til, at einstaki sjúklingurin fær eina heildarviðger har, sum hann einaferð er innlagdur. Ístaðin fyri at flyta sjúklingin av eitt nú stongdari deild á opna deild undir viðgerðini, skulu karmarnir gerast so liðiligir, at til ber at broyta innrættingina á teirri einstøku deildini alt eftir hvønn tørv sjúklingurin hevur. Hetta er ein nýggj skipan, sum krevur umbyggingar av verandi stovnum. Men møguliga krevur hetta eisini eina hugburðsbroyting hjá teimum, sum virka undir verandi skipan.

### Eftirútbúgvin og førleikamenning

Tórmóður kemur eisini inná tørvin á eftirútbúgving av psykiatrisku starvsfólkunum.

–Tað er umráðandi við støðugari førleikamenning, um psykiatrisku starvsfólkini framhaldandi skulu orka at loysa sínar uppgávur á fullgóðan hátt. Psykiatriin hevur bara starvsfólki sum amboð. Har er eingin framkomin tøkni. Skal okkara tøkni vera betri, mugu okkara starvsfólk mennast.

Tað, at psykiatrisku starvsfólkini brúka seg sjálvi í arbeiðinum merkir, at tey støðugt mugu fyllast upp uttan fyri skipanina.

–Annars steðga tey upp, og kunnu ikki loysa tað uppgávuna tey eru sett til, sigur Tórmóður Stórá.

Starvsfólkini gera sjálvi vart við, at har er ein ónøktaður tørvur, sum er. Tórmóður Stórá sigur, at starvsfólkini eftirlýsa tilsjón (supervisión) og eftirútbúgving. Tilsjón skal m.a. staðfesta, hvør tørvur er á eftirútbúgving. Men týdningarmeiri við tilsjónini er kanska, at starvsfólkini fáa møguleika til at taka spurningar og ivamál upp til orðaskifti við tilsjónarfólkini. Í eini skipan, har øll renna so skjótt sum tey orka, er orkan til at geva hvørjum øðrum góð ráð og vegleiðing ivaleyst avmarka. Hesi ráð og henda vegleiðing kundi so komi frá tilsjónarfólkunum tá tørvur var á tí.

### Gransking í Føroyum

Í álitinum verður lagt upp til, at dentur skal leggjast á psykiatriska gransking í Føroyum. Men hvørji úrslit kunnu vit granska okkum fram til í Føroyum, sum ikki longu eru kend úti í heimi? Tórmóður Stórá sigur, at Føroyar eru eitt áhugavert øki til at gera epidemiologiskar kanningar. Íbúgvatalið er lítið og møguleikin fyri at halda skil á ættarbondum er rættiliga góður. Tí er møguleikin fyri at gera kanningar, serliga ílegugransking, sera góður í Føroyum. Annars sigur Tórmóður Stórá, at sálarliga heilsustøðan í Føroyum tykist vera ógvuliga lík heilsustøðuni í londunum rundan um okkum. Broytingar í sálarligu heilsustøðuni í eitt nú Danmark síggjast aftur í Føroyum – bara 2–3 ár seinni.

Vit vita lítið ella einki um sálarligu heilsustøðuna í Føroyum undan 1970. Men kanningar gjørdar hesi seinastu 30 árini vísa, at sum heild er sálarliga heilsustøðan í Føroyum tann sama sum í Danmark.

### Donsk pakkaloysn

Eg spyrji Tórmóð Stórá, hví arbeiðsbólkurin hevur valt at taka støði í danskari lóggávu og donskum tilráðingum sum grundarlag undir eini serføroyskari skipan.

–Góður spurningur, svarar Tórmóður. Nokk tí tað er tað man kennir best, tað sum onkursvegna er léttast. Vit hava hugt at skipanum aðrastaðni, men tá vit skuldu finna málsetningar valdu vit rættningslinjurnar hjá Sundhedsstyrelsen. Higartil hava vit havt danskar traditiónir og lóggávu á økinum og fólk hava fingið sína útbúgving í Danmark. Vit hava valt at taka støði í Danmark ivaleyst tí at tað fall léttari. Tað var ikki eitt "kvalifisera" val.

Men hví ikki hyggja at ymsum skipanum, og so taka tað besta úr hvørjari?

–Tað kundi man gjørt. Vit hava valt tað, sum fall okkum léttast. Vit hava ikki sett okkum fyri at kanna, hvør skipan er best. Man kundi diskutera hvørja skipan man skuldi hava. Tað ruddiligasta hevði verið at tikið eina grundleggjandi diskussión av øllum lóggávuøkinum. Men tann diskussiónin hevur verið aðrastaðni. Tað hevði verið gott at fingið diskutera tað politiska og etiska í sambandi við psykiatriina, men tað tekur tíð. Og tað sum tey avvarðandi vilja hava, er ein skipan, sum kann tryggja rættindini hjá sjúklinginum betri. Tann danska skipanin tryggjar hesi rættindini, og so velur man tað donsku skipanina. Harvið hevur man eina discount-loysn. Men hon kann væl vera nøktandi fyri tað.

### Hví velja eina discount–loysn?

–Tað er ein skjót og bílig loysn. Vit skulu hava tryggja rættarstøðuna hjá sjúklingunum. Tað hevur man gjørt í Danmark. Við at taka tað donsku loysnina, tryggja vit rættarstøðuna í Føroyum. Tað ruddiligasta hevði verið, at fingið tað politiska kjakið í Føroyum. Men tað krevur nógva orku, sum so kanska má takast aðrastaðni úr skipanini. Og tað er kanska betri at brúka ta orkuna uppá viðger.

–Tann skipanin, sum vit skjóta upp, er fult forsvarlig, men hon kundi verið betri tilpassað til føroysk viðurskifti. Nógv í teirri donsku lóggávuni er kanska óføroyskt og tað kundi verið áhugavert at fingið diskutera tað ígjøgnum. Men í Danmark var í nógv ár ein stórt orðaskiftið um hetta. Tað hevur ikki verið í Føroyum. Tað hava verið nøkur pip, serliga frá avvarðandi. Men tað hevur ikki verið nøkur veldig diskussión. Og man hevur ikki strongt á at fáa nakra lóggávubroyting, sum man gjørdi í Danmark. Man hevði sterkar kreftir innanfyri antipsykiatriina, Galebevægelsen til dømis. Men tað hevði man ongantíð í Føroyum.

–Tað hevði heilt sikkurt verið áhugavert at fingið diskussiónina í Føroyum, men tað hevði verið ov orkukrevjandi. Vit kunnu fáa eina brúkiliga skipan bíliga við at umseta úr donskum. Loysnin er jú brúkt fyrr, sigur Tórmóður Stórá, sum hevur verið við til at skriva álitið Heildarpsykiatri 2002.

*–Vit vilja hava, at greiður skilnaður verður gjørdur ímillum tær læknaligu uppgávurnar og tær uppgávurnar, sum aðrir fakbólkar skulu loysa. Tað er ein tradition, at tá fólk skulu til ambulant kontrol, so skulu tey hitta ein lækna. Men í 8 av 10 førum er hetta als ikki neyðugt heldur Tórmóður Stórá, sum hevur verið samskipari í stýringsbólkinum, sum hevur gjørt álitið, Heildarpsykiatri 2002*

*Myndir: Jens Kristian Vang*





## Listin hjá Fólkaflokkinum í Norðoyggjum liðugur

Fólkaflokkurin í Norðoyggjum er liðugur við uppstillingina til komandi løgtingsval, og flokkurin stillar upp hesi valevni:

- Jógvan Edmund á Geilini, lærari
- Petur Hans Joensen, lærari
- Anfinn Kallsberg, løgmaður
- Jógvan við Keldu, løgtingslimur
- Jákup Mikkelsen, stjóri
- Kristian Fríðrik Olsen, býráðslimur
- Rúna Sivertsen, løgtingslimur

## Norðurlendskt starvsfólkaumbýti

TÍÐINDASKRIV
*Nýskipanardeildin, Løgmansskrivstovan*

Norðurlendska tænastumannaumbýtisskipanin ger tað møguligt hjá starvsfólki í landsfyrisitingini at fara til eitt av norðurlondunum at arbeiða í eina tíð. Stuðul verður veittur til at gjalda ferða- og uppihaldsútreiðslur hjá luttakara.

Henda skipan hevur verið í gildi síðan 1979 og endamálið við skipanini er at fremja norðurlendskt samstarv. Endamálið er somuleiðis at geva luttakarunum kunnleika til fyrisiting og lóggávu o.a. í hinum norðurlondunum.

Tað er ikki neyðugt at luttakari býtir um pláss við ein starvsfelaga í einum øðrum norðurlandi, tó er onki, sum forðar fyri hesum.

Í 2002 hava Føroyar fingið tillutað kr. 61.000,- at nýta til hesa skipan.

### Skipanin virkar soleiðis

Skipanin fevnir um bæði tænastu- og starvsmenn. Uppihaldið kann vara millum 1 og 12 mánaðir í einum kalendaraári.

Stuðulin er í árinum 2002 kr. 7.000,- um mánaðin umframt ferðaútreiðslur aftur og fram. Endurgjald verður bert latið fyri ferðing á bíligasta hátt. Um uppihaldið er longri enn 6 mánaðir kunnu ferðaútreiðslurnar hjá familju somuleiðis verða goldnar, um hon flytir við, eins og goldið verður fyri flutning av neyðugum innbúgvi.

Treytin fyri at fáa stuðul er, at viðkomandi fær frí við løn úr starvi sínum. Tíðin verður tald við í lønar- og eftirlønaraldri.

Tey, sum vilja nýta skipanina, mugu sjálvi gera avtalu við stovn í øðrum norðurlandi.

Áðrenn 3 mánaðir eru farnir eftir heimkomu, skal luttakari senda Løgmansskrivstovuni eina frágreiðing um uppihaldið, heruppií ein stuttan samandrátt á skandinaviskum máli t.d. á donskum, sum Løgmansskrivstovan sendir avgreiðsluskrivstovuni hjá Norðurlandaráðharraráðnum.

### Umsóknir

Umsóknir um stuðul skulu sendast til Løgmansskrivstovuna ígjøgnum stýrið/leiðsluna á stovninum. Umsóknin skal innihalda fylgjandi upplýsingar:

1. Navn á umsøkjara, føðingardagur og bústaður
2. Starvsheiti, starvsaldur og starvsstaður
3. Arbeiðsuppgávur
4. Navn og bústaður á tí stovni, avtala er gjørd við og tíðarskeið
5. Upphæddin, sum søkt verður um - tíðarskeið og ferðaútreiðslur

Tað skal upplýsast, um umsøkjari hevur søkt um at fáa annan stuðul.

Umsóknin skal innihalda eitt ummæli frá stovninum, har stovnurin sigur frá, um viðkomandi kann fáa tænastufrí við løn.

Umsóknarfreistin er 1. mai 2002. Umsóknir, sum koma inn aftaná hesa dagfesting verða bert viðgjørdar, um peningur er tøkur.

Nærri upplýsingar um skipanina fáast við at venda sær til Løgmansskrivstovuna – nýskipanardeildina og fáast eisini við at fara á heimasíðuna hjá Nordisk Ministerråd.

*http: //www.norden.org og hyggja undir Støtteordninger og Nordisk utbytestjänstgöring*